# Inni í



Rókur Jákuppson Jakobsen er sangari í All That Rain og hevur eisini givið egna EP út. Her skrivar hann um síni upplivilsir frá Asfalt.
Mynd: Jens Kr Vang, Àlvur Haralden, Dagfinn Olsen, Frantz Galan

**Eg eiti Rókur Jákupsson Jakobsen, og eg eri tónleikari. Sum oftast lýsi eg tónleik, og tónleikatiltøk sum áskoðari, men hesaferð fari eg at lýsa tiltakið frá hinari síðuni. Eg upptraðkaði sjálvur á Asfalt, og eg ætli at greiða frá, hvussu eg upplivdi Asfalt innanífrá.**

ASFALT
*Rókur Jákuppson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*



*Aftaná var eg enntá so heppin, at eg slapp at skriva 4 autografar á armarnar á nøkrum smágentum*



### Áðrenn

Fyri uml. tveimum mánaðum síðan, vórðu vit í All That Rain bidnir um at luttaka á Asfalt. Hetta gleddi okkum óført, tí at vit sóu hetta sum eitt høvið at framføra okkara egna tónleik. Vanliga spæla vit til dans, og tá skalt tú helst bara spæla slagarar, sum øll kunnu tralla við til. Sostatt var Asfalt eitt frískt lot fyri okkum í bólkinum.

Hetta setti dám á komandi venjingarnar hjá All That Rain. Vit tímdu betur og betur at skriva og skapa tónleik, og sóu Asfalt sum eitt veruligt mál. Tað var her at tónleikurin skuldi framførast.

Umframt at spæla við All That Rain, skrivi eg tónleik til mín sjálvs. Í mars mánaði gav eg mína fyrstu EP, og síðan havi eg roynt at verið úti um meg, fyri at marknaðarføra mín tónleik. Tískil kom tað eisini sera væl við, tá ið fyrireikararnir av Asfalt spurdu, um eg var sinnaður at framføra hendan tónleikin. Sjálvandi var eg við uppá tað, og nú var bara eftir at savnað tónleikararnir og venja sum svakir.

Av tí at Asfalt var sett saman kring einar 60 tónleikabólkar, merktist eitt yvirlapp av tónleikarum. Allir hesir bólkar eru mannaðir av nøgvum ymiskum tónleikarum, men tað er eyðsæð at










